## Broyta byggisamtyktina

**Hellurnar:** Í eina tíð hevur verið arbeitt við at fyrireika gerð av einum vatnreinsiverki á Hellunum.

Á seinasta býráðsfundi í Fuglafirði, har Hellurnar eru partur av, var hetta málið til viðgerðar. Neyðugt er nevniliga at gera broytingar í byggisamtyktini, tí økið upprunaliga er útlagt sum frílendi. Hetta varð samtykt.

Býráðið hevur frammanundan tikið avgerð um at keypa hetta økið, ið liggur inni í sjálvari bygdini, og byggja vatnreinsiverkið her.

**sb.**

## Skulu rudda og planta

**Gøta:** Leygardagin 12. mai nýtist ongum at ganga fyri einki í Gøtu.

Henda dagin er ætlanin at hava enn ein ruddingardag í øllum bygdunum í Gøtu kommunu.

Dagurin byrjar við kaffi og rundstykkjum og endar við grilling í skúlagarðinum.

Sum nakað nýtt hevur kommunan bílagt sær plantupakkar frá Skógrøkt Landsins. Ætlanin er síðani at býta út ein plantupakka til hvørt húskið, sum er við í ruddingini.

**sb.**

# Lonin longu vorðin ov lítil




*Lonin er ikki ársgomul, men er longu vorðin ov lítil. - Hetta kemur ikki óvart á meg, sigur eigarin, Sámal Hanne Lognberg*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Minni enn eitt ár eftir at handilsdepilin Lonin í Skopun lat upp, eru ætlanir frammi um eina størri víðkan.**

**– Fleiri hava áhuga at byrja handlar her hjá okkum, sigur eigarin, Sámal Hanne Lognberg**

HANDIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skopun:** Tað var í mai mánaði í fjør, at skopuningar og sandoyingar fingu eitt nýtt høvi at fara til handils.

Tá lat nevniliga Lonin upp í Skopun. Her varð møguleiki at fara inn í ein vanligan matvøruhandil, eina telebúð og í eina frisørsalong í einum og sama bygningi.

Mong vóru kanska í iva um, ein slík ætlan í einum so avmarkaðum øki, kundi bera til.

Hesir seinastu mánaðirnir hava prógvað at tað bar til - og fer at bera til:

– Í løtuni hava vit eini 4-5 fólk, sum hava áhuga at fara undir handilsvirksemi her hjá okkum.

– Men áðrenn vit koma so langt, er neyðugt at byggja handilsdepilin út, sigur Sámal Hanne í samrøðu við Sosialin.

Tað arbeiða tey eisini við at fyrireika í løtuni.

Miðað verður eftir, at teir nýggju handlarnir sleppa inn í Lonina um jóltíðir í ár.

### 300 fermetrar aftrat

Lonin stendur fyri seg sjálva ovarlaga í bygdini. Verandi bygningur er 550 fermetrar stórur.

Rundan um er eitt stórt øki, sum í dag verður nýtt sum bilpláss. Men ætlanin er at taka av hesum økinum fyri at kunna vaksa um handilsdepilin.

– Vit miða eftir at víðka Lonina við eini 300 fermetrum aftrat, sigur Sámal Hanne.

Hetta kann hann gera við góðum treysti, tí mong eru áhugað at fara undir handilsligt virksemi her.

Talan er bæði um handlar við klædnavørum, kropsrøkt og møguliga eisini ein handil við barnaklæðum.

Hinvegin so kann staðfestast, at eingin veruligur skógvahandil er í Sandoynni. Gongst sum ætlað er ikki óhugsandi, at ein slíkur handil er í nýggju ætlanini.

### Trúði uppá tað

At so stórur áhugi er fyri Lonini kemst helst av tí, at her ber til at fáa fleiri vørur og tænastur á sama staði.

Hesin áhugin kemur als ikki óvart á Sámal Hanne:

– Nei, tað ger hann als ikki, slær eigarin av Lonini fast.

Tá hann fyrireikaði Lonina ynskti hann at gera bygningin munandi størri og fáa enn fleiri handlar inn beinanvegin.

Hinvegin trúðu fíggingarstovnarnir ikki rættiliga uppá hesa ætlanina.

– Sjálvur trúði eg uppá tað allatíðina. Men í dag trúgvi eg, at teir eisini gera tað, sigur hann.

## Størri opinleiki á Strondum

**Sjóvar kommuna:** Fyrr í vikuni fekk Sjóvar kommuna nýggja heimasíðu.

Arbeitt hevur verið við hesi ætlanini í eina tíð, og umsíðir er henda síðan vorðin klár. Við hesi tænastuni ynskir kommunan at veita borgarunum eina tænastu allar 24 tímarnar í samdøgrinum.

Hóast Strendur telist millum miðalstóru kommunurnar í landinum, stendur heimasíðan lítið aftanfyri tær hjá teimum stóru.

Her ber til at finna upplýsingar um so at siga øll viðurskifti, ið hava við kommunu, bygdir, tænastur og annað virksemi. Og her fær ein somuleiðis innlit í, hvat verður samtykt á bygdaráðsfundunum.

**sb.**